# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# VB skal aftur á beint

**Eftir at tær hava mist framúr støðuna á stigatalvuni, skal VB sunnudagin royna at fáa skútuna aftur á beint, tá tær taka ímóti Stjørnuni**



HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri bara góðum mánaði síðani bendi alt á, at VB so syngjandi skuldi verða partur av FM-finaluni í kvinnuhondbólti.

Tap í Klaksvík, Runavík og í Havn hava tó skeiklað hesa myndina heilt nógv, og nú er VB saman við Tjaldri og Neistanum í knallharðari kapping um at røkka einum finaluplássi.

Har verður Stjørnan eftir øllum at døma hin parturin, og júst Stjørnan er mótstøðuliðið, nú VB fer undir fyrsta av trimum avgerandi heimadystum móti hinum FM-biðlunum.

Fyri VB er eingin ivi um, at hetta er dysturin, har tær veruliga aftur kunnu rætta skútuna upp, so sleppast kann um vandaskerini, sum er komin seinasta mánaðin.

Hjá Stjørnuni er støðan ikki heilt tann sama. Oddaliðið kann neyvan klossað somikið í tí nú, at tær skulu missa finalusessin, men hinvegin ger tað eisini, at tær spæla uttan tað heilt stóra trýstið, og ivaleyst vilja tær heldur enn fegnar gera sítt til at staðfesta, at tær skulu verða partur av finaluni.

Í hinum báðum dystunum eru favorittarnir sera greiðir. Tjaldur spælir móti Kyndli, sum tær hitta aftur týskvøldið í útsettum dysti, og neyvan hava tær nakrar ætlanir um, at Kyndil skal fáa síni fyrstu stig júst nú.

Og í Havn tekur finaluheita Neista-liðið móti StÍF í einum dysti, har heimaliðið er stórfavorittur.

## Dystir um vikuskiftið

**HONDBÓLTUR**
**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 22.02 | 14.30 | Neistin-StÍF |
| 22.02 | 15.00 | Tjaldur-Kyndil |
| 22.02 | 15.00 | VB-Stjørnan |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 22.02 | 16.00 | Neistin-StÍF |
| 22.02 | 16.00 | H71-VÍF |
| 22.02 | 16.00 | KÍF-Kyndil |

**FLOGBÓLTUR**
**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 22.02 | 14.00 | Dráttur-KÍF |
| 22.02 | 16.00 | SÍ-Fleyr |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 20.02 | 19.00 | ÍF-Mjølnir |
| 22.02 | 14.00 | SÍ-Fleyr |

# Nú vil SÍ hava greipuna

**Eftir at hava bast Fleyr í steypafinaluni, skal SÍ nú endurtaka sigurin í royndini at gerast greipuvinnarar**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Fagnaðurin um steypasigurin hevur ikki meira enn lagt seg í Sørvági. Og nú riggar bygdin seg longu til at taka ímóti enn einum steypi.

SÍ hevur alt árið verið oddalið í Eik-liguni hjá kvinnum, og vinna tær heimadystin móti Fleyr sunnudagin, staðfesta tær hesa støðuna somikið virðiliga, at tær eisini standa við heitinum sum FM-vinnarar.

Tað er lítið at ivast í, at SÍ má roknast sum favorittur undan dystinum. Men Fleyr vísti hinvegin í steypafinaluni, at tær væl kunnu spæla heilt upp við SÍ, um tær bara fáa nervarnar upp á pláss, so tað er av sonnum lagt upp til satt brak – og kanska gullveitslu – í Sørvági sunnudagin.



*Eftir at hava vunnið sær steypaheitið seinasta leygardag, er tað nú FM-heitið, sum stendur fyri framman hjá Sørvágskvinnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Suni úr Hørg til B36

**B36 og sumbingurin Suni úr Hørg hava skrivað undir eitt ára sáttmála**

FÓTBÓLTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað kemur helst ikki óvart á nakran, at B 36 hevur styrkt hópin hjá sær við ársins leikara hjá VB/Sumba í fjør, tí talan er um sterkan verjuleikara.

Longu er greitt, at B 36 hevur tørv á fólki í verjuni, tí teir hava mist Alex Dos Santos, Dimitri Jancovic og Oddmar Færø.

Suni úr Hørg er fram til jólar 26 ára gamal og hevur fyri tað mesta spælt við VB/Sumba

## Heini og Ajax taptu tepurt

**Hóast tap, so gav Ajax FCK góða mótstøðu**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Ajax Keypmannahavn tók ímóti oddaliðnum, FCK Håndbold í Bavnehøj høllini í Keypmannahavn. Oddaliðið, FCK vann dystin 35-32, men tað var eitt tungt tak hjá oddaliðnum at knúgva Heina Hanusarsyni og hinum í Ajax Keypmannahavn. Ajax spældi ein góðan 1. hálvleiki, og var Ajax á odda 18-15 í steðginum. Men í 2. hálvleiki setti FCK ferðina upp, og vóru teir væl betri í 2. hálvleiki. Og endin var eisini, at teir hvítu vunnu í uppgerðini, sum av mongum í Keypmannahavn verður skýrd at verða uppgerðin millum teir ríku (FCK) og teir fátæku (Ajax).

Ajax liggur næstniðast í bestu donsku hondbóltsdeildini við 5 stigum. FCK liggur næstovast við 30 stigum. Heini Hanusarson skeyt 4 mál í dystinum. Heini hevur skotið 54 í kappingini higartil.